## Dýrari at roykja

Umboð fyri 120 lond sita í hesum døgum á fundi í Sveits og umrøða eitt uppskot, sum skal fáa fólk at leggja av at roykja, og sum skal forða fyri, at onnur yvirhøvur fara at festa sær í.

Ætlanin er, at tey 120 londini skulu semjast um ein felags sáttmála, sum skal binda tey til at seta prísin á sigarettum minst fimm prosent upp. Heimsbankin hevur roknað út, at verða sigarettirnar fimm prosent dýrari, fara umleið 40 milliónir roykjarar at leggja av, og onnur fara at hveppa seg við at byrja.

Tað veruliga endamálið við uppskotinum er at avmarka sjúkur, sum standast av tubbaki.

## Løgreglan verjir fiskin

Norskir lastbilar, sum fara til Italia við fiski, fáa nú løgregluverju.

Orsøkin til hetta sjáldsama tiltakið er, at seinasta summar rændu búrkroppar fleiri lastbilar við norskum fiski. Tað hevði við sær, at norsku tryggingarfeløgini sýttu fyri at tryggja fiskin, sum skuldi til Italia, og vandi var fyri, at norska fiskivinnan fór at missa umleið eina milliard krónur í útflutningsvirði.

Eftir trýsti frá uttanríkisráðnum í Oslo hava italsku myndugleikarnir játtað at verja lastbilarnar. Tjóvarnir gjørdu serliga um seg á leiðini millum Rom og Napoli, og tí standa løgreglumenn í búna fram við vegnum nú fyri at verja norsku lastbilarnar. Úr Noregi verður sagt, at eingin lastbilur er rændur, síðani løgregluvaktarhaldið varð skipað.

## ST kennir seg hótt

Seinastu dagarnar hava øll flogfør hjá ST, sum eru komin til Afghanistan, fingið boð um at nýta floghavnina í Bagram, har altjóða friðarherdeildin hevur høvuðsstøð.

Vanliga plaga flogførini hjá ST og øðrum felagsskapum at nýta floghavnina í høvuðsstaðnum Kabul, men ein talsmaður hjá ST segði í gjár, at viðurskiftini har hava ikki verið nóg trygg seinastu dagarnar. Tí hava flogførini sett seg í Bagram, sum er nakað norðan fyri Kabul.

Hvørki ST ella aðrir myndugleikar hava kortini sagt nakað um, at nakar hevur hótt við tiltøkum í floghavnini í Kabul.

## Skutu eftir trolara

Ein norskur trolari, sum var á veg inn til Murmansk at landa upsa, noyddist at venda aftur.

Trolarin »Øyaskjær« hevði fingið boð frá russisku myndugleikunum um at steðga á einum ávísum staði, tí russiski flotin hevði venjing har á leiðini. Men beint áðrenn norska skipið kom á tað avtalaða staðið, skjeyt eitt russiskt herskip ávaringarskot eftir norska trolaranum.

Norski skiparin royndi at greiða frá, at teir høvdu fingið loyvi at fara til Murmansk, men einki hjálpti. Frá herskipinum fekk hann boð um at venda aftur í norskan sjógv.

Tað var norska ráfiskakeyparafelagið, sum hevði givið »Øyaskjær« boð um at landa í Murmansk, og pappírini vóru í lagi. Nú verður kannað, hví trolarin kortini fekk boð um at venda aftur.

# Vænta eina røð av yvirgangsatsóknum

**Fyrst festi ein bumba eld í eitt franskt oljutangaskip, síðani varð ein amerikanskur hermaður skotin í Kuwait, og nú doyðu 189 fólk í bumbuspreingingum á Bali. Serfrøðingar vænta, at hetta er bara byrjanin til eina røð av yvirgangsatsóknum**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Yvirgangsserfrøðingar í amerikansku stjórnarumsitinginini siga, at enn er ov tíðliga at siga, um tær tríggjar atsóknirnar í Jemen, Kuwait og Indonesia hava nakað samband hvør við aðra, men felags fyri tær er, at felagsskapurin al-Qaeda er settur í samband við allar tríggjar atsóknirnar.

– Atsóknirnar eru í hvussu er eitt tekin um, at viðhaldsmenn hjá Osama bin Laden eru framvegis førir fyri at søkja at amerikanskum og vesturlendskum áhugamálum, segði ein av teimum amerikansku serfrøðingunum í gjár.

Enn hevur eingin átakið sær ábyrgdina av teirri blóðugu atsóknini á Bali, men indonesiskir og avstralskir myndugleikar hava illgruna til felagsskapin Jemaah Islamiyah, sum hevur samband við al-Qaeda.

Summir serfrøðingar halda, at teir seinastu bandupptøkurnar við Osama bin Laden og næstovasta hansara Ayman al-Zawahiri kunnu tulkast sum ein áheitan um at seta fleiri yvirgangsatsóknir í verk.

Upptøkurnar, sum vórðu almannakunngjørdar í arabiska sjónvarpinum al-Jazeera herfyri, fingu amerikansku myndugleikarnar at herða tilbúgvingina bæði í sjálvum USA og á amerikansku sendistovunum kring heimin.

# Grátandi heimaftur – av gleði

**24 ár eftir, at tey vórðu burturflutt til Norðurkorea, vórðu tey móttikin sum hetjur í Japan**



*Fukie Hamamoto (vm.) undir liðini á manni sínum Yasushi Chimura og Kaoru Hasuike vóru millum teir tríggjar burturflutu japanararnar, sum í gjár komu til Tokyo at vitja – fyri fyrstu ferð í 24 ár*

Fimm japanar, sum vórðu burturfluttir til Norðurkorea í 1978, komu í gjár við flogfari til Tokyo, har tey skulu steðga fjúrtan dagar.

Tey fimm vórðu rænd har norðuri í Japan, tí tey skuldu læra norðurkoreanskar njósnarar japanska málið og japanskar siðir. Norðurkoreanar hava viðgingið, at teir rændu 13 japanar, og í Japan verður hildið, at tey fimm eru tey einastu, sum enn eftir á lívi.

Líka síðani 1978 hava norðurkoreanskir myndugleikarnir tvíhildið um, at teir vistu einki um teir horvnu japanarnar, men í síðsta mánað viðgekk norðurkoreanski leiðarin, Kim Jong-il, at Norðurkorea hevði burturflutt tey 13 fólkini. Avdúkingin kom, tá japanski forsætisráðharrin, Junichiro Koizumi, var í Norðurkorea.

Norðurkoreansku myndugleikarnir hava sagt, at átta av teimum burturfluttu eru deyð av sjúku ella vanlukku, og at onkur tók lívið av sær. Men í Japan halda fleiri, at summi av teimum átta eru framvegis á lívi.

Tað verður ikki hildið, at tey fimm, sum nú eru komin til Japan, fara at siga stórvegis um viðurskiftini hjá teimum burturfluttu, tí tey hava øll skyldfólk eftir í Norðurkorea.

# Harðari revsing fyri barnaporno

**ES-londini eru samd um, at persónar, sum fáast við barnaporno, skulu revsast harðari enn higartil**

BARNAPORNO
*Árni Joensen:*

Løgmálaráðharrarnir í ES-londunum samdust fyrradagin um at herða revsingina hjá teimum, sum gera, selja ella hava barnapornografiskt tilfar.

Tær nýggju lógirnar hava til endamáls at verja børn og ung ímóti at verða misnýtt í tí umfatandi pornografiska ídnaðinum. Samstundis verður tað forboðið at gera, selja ella at hava sokallað eftirgjørt pornografiskt tilfar, sum er gjørt við teldu, og alt barnapornografiskt tilfar á alnótini verður bannað.

Danski løgmálaráðharrin, Lene Espersen, sigur, at í Danmark verður revsingin fyri at breiða út ella selja barnapornografiskt tilfar herd úr tveimum í fimm ára fongsul.



# Fólk ov sein til bussarnar

**Broytingar hjá Standferðsluni hava havt við sær, at uppgivnu fráfaringartíðirnar í Ferðaætlanini hjá bussum úr Havn og Kollafirði eru skeivar. Allar fráfaringartíðir hjá bussum úr hesum báðum støðum eru nevniliga fluttar fimm minuttir fram**

BUSSRUTUR
*Heini í Skorini*




*Tað hevur vakt ans millum ferðandi úr Havnini og Kollafirði, at bussarnir eftir broytingum frá Strandferðsluni fara fimm minuttir fyri uppgivnu tíðir í Ferðaætlanini, og hóast Strandferðslan hevur upplýst um hetta, hevur ørkymling verið millum kundar hjá bygdaleiðum*

Mong ferðandi úr Havnini hava seinastu tíðina upplivað og gjørt vart við, at hóast tey eru møtt til tíðina á Farstøðini ella á bussteðgistøðum, eru bussarnir longu farnir undan teimum. Og fylgjurnar av hesum kunnu saktans vera álvarsamar og óhepnar fyri ferðandi í týdningarmiklum og tíðarbundnum ørindum.

Orsøkin til hetta er, at Strandferðslan hevur flutt allar bussrutur úr Havn og Kollafirði fimm minuttir fyri áður uppgivnu tíðir, samstundis sum Ferðaætlanin í heimum kring Føroyar vísir gomlu fráfaringartíðirnar hjá bussunum.

### – Hava upplýst væl og virðiliga

Regin Vágadal á Strandferðsluni vísir á, at hesar broytingar eru upplýstar væl og virðiliga, og at teir á Strandferðsluni hava gjørt sína skyldu.

– Av tí at bussførararnir høvdu ov stutt skotbrá at halda tíðirnar og harvið máttu koyra ov skjótt, valdu vit av trygdaráðum at flyta fráfaringartíðirnar til fimm minuttir fyrr, so bussførararnir bæði kunnu yvirhalda tíðirnar og koyra lógliga, sigur Regin Vágadal.

Hann vísir víðari á, at hetta hava teir lýst væl og virðiliga, tí umframt at hava verið í ávísum fjølmiðlum, hava teir eisini gjørt 6000 faldarar, har upplýst verður um nýggju tíðirnar. Undir varandi broytingum á heimasíðuni hjá Standferðsluni er eisini upplýst, at bussarnir nú fara fimm minuttir fyrr, og tískil heldur Regin Vágadal, at parturin hjá Strandferðsluni ikki liggur eftir.

### Nýggj ferðaætlan ov dýr

15. juli gjørdi Strandferðslan hesa broyting, men trupulleikin er, at nýggjasta Ferðaætlanin kom út 8. apríl, og tískil er núverandi Ferðaætlan, sum fólk flest nýta og sum eftir røttum skuldi víst røttu fráfaringartíðirnar, ikki í samsvar við nær bussarnir fara av Farstøðini í Havn við ferðafólki.

Av tí at broytingin er framd, eftir at nýggjasta ferðaætlanin er útgivin, liggja faldararnir um nýggju busstíðirnar væl at merkja bert í Ferðaætlanunum, sum enn ikki vórðu keyptar, tá faldararnir vórðu útgivnir, og er hetta sjálvsagt óheppið.

Spurningurin er, um nýggj Ferðaætlan ikki hevði verið ein betri loysn, so íbúgvar ikki koma illa fyri, tá týdningarmikil ørindi skulu fullførast gjøgnum Strandferðsluna, tí tað er avmarkað, hvussu nógv keypa Ferðaætlanina mánaðir eftir, at hon er útgivin.

Regin Vágadal vísir í hesum sambandi á, at ein Ferðaætlan er ógvuliga dýr, við tað at 20-25.000 eintøk verða prentað, og at ein Ferðaætlan ikki bara kann verða givin út í bræði. Hann leggur eisini afturat, at tá undirsjóvartunnilin opnar, verða stórar rutubroytingar eisini gjørdar, og tískil vildi Strandferðslan bíða nakað við útgeving av nýggjari Ferðaætlan.

### Trupulleikin er føroyskur mentalitetur

Regin Vágadal sigur, at tað sjálvsagt er sera óheppið, at Strandferðslan miðskeiðis í einum tíðarskeiði noyðist at broyta fráfaringartíðirnar, men at trupulleikin eins nógv er føroyski mentaliteturin við uppmøting.

– Hví ikki bara møta 10 minuttir fyrr sum aðrastaðni? Tað er eins nógv føroyski mentaliteturin altíð at vera í seinastu løtu, sum er orsøk til henda trupulleika, sigur Regin Vágadal at enda við Sosialin.

# Eimskip reisigildi í bingjum

**Fríggjadagin 11. oktober helt Eimskip reisigildi í sambandi við, at nýggi goymslu- og skrivstovubygningur teirra varð reistur mikudagin 9. oktober á Skansabryggjuni í Havn**

REISIGILDI
*Heini í Skorini*



*Av tí at veðrið var so vánaligt undir Eimskip reisigildinum fríggjadagin, varð avgjørt at fara inn í bingjur, har tónleikarar fløvaðu vátu gestunum*

6. juni í summar varð hol sett á arbeiðið at gera nýggjan bygning hjá Eimskip á Skansabryggjuni í Havn, og mikudagin 9. oktober varð bygningurin reistur. Ætlanin er, at nýggi bygningurin verður tikin í nýtslu í desember mánaði, og fer bygningurin bæði at hýsa skrivstovum og goymslu.

### Framkomin og stórur bygningur

Talan er um ein stóran og framkomnan bygning, sum fer at hava nýggjastu amboð og hentleikar á goymsluøkinum.

Tilsamans verður húsið 15000 fermetrar til støddar, og 26 fólk fara at starvast í nýggja bygninginum, so tey á Eimskip høvdu avgjørt nakað at hátíðarhalda niðri á Skansabryggjuni fríggjadagin.

Linda Bjørk Gunnlaugsdóttir, stjóri á Eimskip í Føroyum, sigur, at sum tað gongur nú, fer tíðarætlanin væntandi at halda, so nýggi bygningurin kann verða tikin í nýtslu beint fyri jól.

### Hátíðarhald í tveimum bingjum

Veðrið var sera vánaligt fríggjadagin, og hetta órógvaði væl at merkja reisigildið. Tískil varð heldur øðrvísi avgjørt at fara inn í tvær bingjur at hátíðarhalda dagin.

Orkestur varð eisini til staðar fríggjadagin, og vóru tað teir báðir Edvard Nyholm Debes og Finnur Hansen, sum syrgdu fyri, at tað var "liv og glade dage" inni í rennvátu bingjunum niðri á Skansabryggjuni.

Tónleikararnir siga, at hetta var fyrstu ferð teir høvdu spælt inni í eini bingju, og at tað altíð er skemtingarsamt at spæla í nýggjum umstøðum.

Hóast veðrið ikki var til vildar, vóru tað sostatt tvær bingjur, sum bjargaðu reisigildinum og hátíðarhaldingum av einum søguligum framstigi hjá Eimskip í Føroyum.